UTTAN ÚR HEIMI

Frágreiðing loynilig

Í Fraklandi hevur Michel Barnier, uttanríkisráðharri, gjørt av, at almenningurin fær ikki at vita, hví palestinski leiðarin, Yasser Arafat, doyði. Sambært ráðharranum hava næstu skyldfólkini hjá Arafat fingið at vita, hvat Arafat bagdi, og skal frágreiðingin almannakunngerast, er tað bara einkjan, Suha, sum kann gera tað.

Arafat varð fluttur á eitt hernaðarsjúkrahús í París tann 29. oktober, og longu tá fóru fólk at gita, um ísraelsmenn mundu hava eitrað hann. Ísraelsku myndugleikarnir hava víst gitingunum aftur, men avgerðin at halda orsøkina til deyða hansara loyniliga ger, at mong framvegis hava illgruna um eitran.

Fronsku læknarnir, sum viðgjørdu Arafat, hava sagt, at hann hevði nógv hvít blóðlikam, at hann hevði ikki blóðkrabba, og at tað var trupult at viðgera hann. Men teir hava sýtt fyri at upplýsa sjálva deyðaorsøkina, og tað sleppa teir ikki at gera aftan á avgerðina hjá uttanríkisráðnum.

Broyting á veg?

Diplomatar í Norðurkorea siga, at í seinastuni hava myndugleikarnir tikið fleiri myndir av landsins leiðara, Kim Jong-il, niður. Talan er serliga um myndir, sum hava hingið á almennum støðum í høvuðsstaðnum Pyongyang.

Diplomatarnir halda ikki, at Kim Jong-il er á veg úr norðurkoreonsku leiðsluni, men at talan heldur er um eina roynd hjá myndugleikunum at fáa fólk at gera minni burtur úr leiðaranum og á tann hátt at rudda slóð fyri búskaparligum nýskipanum. Kim Jong-il tók við sum leiðari í Norðurkorea í 1994, og tað sigst, at hann fleiri ferðir hevur sagt seg vera ímóti teimum nógvu myndunum av sær.

Ein útlendskur diplomatur í Pyongyang sigur við fronsku tíðindastovuna AFP, at ein ávísur spenningur hevur verið í býnum seinastu dagarnar. Hann heldur hetta vera eina ábending um, at eitt ella annað er í umbúna, og at okkurt fer at henda á tí politiska økinum um stutta tíð.

Vilja hava vald

Indiánarnir í Brasil eru av álvara farnir at blanda seg upp í politikk. Á kommunuvalinum herfyri fingu flokkar hjá indiánunum umboð í meiri enn 100 av teimum 5600 kommunustýrunum, og tað er nógv meiri enn á valinum fyri fýra árum síðani.

Agnaldo Xukuru, sum er valdur í eitt kommunustýri í landnyrðingspartinum av Brasil, sigur við Aftenposten, at higartil hava indiánarnir í Amazonas-økinum dúvað upp á hjálp og stuðul frá útlendskum vælgerðarfelagsskapum. Nú er tíðin komin til, at indiánarnir taka sær av sínum áhugamálum, sigur hann og leggur aftur-at, at í fyrsta umfari fer hann at virka fyri betri skúla- og heilsuviðursiftum í teimum indiánsku økjunum.

Tá portugisar komu til Brasil fyri 500 árum síðani, búðu umleið seks milliónir indiánar har, men í dag eru teir bara 740.000 í tali. Teir eru býttir sundur í 250 ættarbólkar, og teir tosa 170 ymisk mál.

Fátæk víkja fyri handlum

Fyrramorgunin fóru myndugleikarnir í kinesiska høvuðsstaðnum Beijing undir at ríva fleiri fátækrahús í býnum niður fyri at gera pláss fyri nýggjum handlum.

Fjølmiðlarnir skriva, at sløkkiliðsmenn og løgreglumenn hjálptu arbeiðsmonnunum, sum brutu fátækrahúsini niður. Tey, sum ikki vildu fara úr húsunum, vórðu tikin og koyrd út. Myndugleikarnir siga, at fátækrabýlingurin, sum er har eysturi í Beijing, skal rívast niður, og at handlar skulu byggjast ístaðin fyri. Tey, sum eiga fátækrahúsini, rokna við at fáa einar 4.000 krónur fyri fermeturin í endurgjaldi, men tað er ikki nóg mikið til eina nýggja íbúð í høvuðsstaðnum, siga tey. Kanska røkka pengarnir til eina lítla íbúð onkunstaðni uttan fyri sjálvan býin, siga tey.

– Tey ríku flyta inn í býin, og vit fátæku noyðast at flyta út býnum, sigur ein kvinna við Aftenposten.

Eingin friðardúgva

Við at tilnevna Condoleezzu Rice hevur Bush tryggjað sær, at uttanríkisráðharrin sigur ikki annað enn tað, sum forsetin hugsar

Við at fáa sær Condoleezzu Rice til uttanríkisráðharra hevur George W. Bush, forseti, gjørt greitt, at tann ágangandi uttanríkispolitikkurin fer at halda fram

USA
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

– Hon hugsar og tosar sum Bush.

Tað er myndin av Condoleezzu Rice, sum nú er tilnevnd amerikanskur uttanríkisráðharri. Ikki síðani Richard Nixon var forseti og Henry Kissinger uttanríkisráðharri hevur so tætt samband verið ímillum forsetan og uttanríkisráðharran. Rice og Bush arbeiða saman, biðja saman og hugna sær framman fyri sjónvarpinum um kvøldarnar. Er Bush í Camp David, er Rice eisini har, og fer Bush til Texas, fer Rice við.

Sum uttanríkisráðharri hevur Colin Powell verið talsmaður fyri, at USA skal samstarva við onnur lond um at loysa heimsins trupulleikar. Soleiðis hugsar Condolleeza Rice ikki. Hon hevur alla tíðina tikið undir við Bush um at breiða demokratiið út til allar partar av heiminum, og at USA eigur at gera tað, sama um onnur lond taka undir við tí ella ei.

Kortini hevur hon av og á verið í parti við Powell. Eitt nú tók hon undir við avgerðini hjá Powell at lata Bretland, Frakland og Týskland loysa kreppuna við Iran, og hon tók eisini undir við honum, tá hann skjeyt upp, at grannalondini hjá Norðurkorea áttu at koma upp í samráðingarnar um ta norðurkoreansku kjarnorkuverkætlanina.

Nógvar uppgávur

Amerikanskir fjølmiðlar spyrja nú, um Condoleezza Rice verður før fyri at temja teir báðar heykarnar í stjórnini, Dick Cheney, varaforseta og Donald Rumsfeld, verjumálaráðharra, tá teir av álvara spenna seg út. Higartil hevur hon kunnað styðjað seg til Powell i slíkum løtum, men tá hon tekur við, er hann ikki har longur, skriva amerikonsku bløðini.

Tey seinastu fýra árini hevur Condoleezza Rice verið trygdarráðgevi hjá Bush. Hetta starvið hevur gjørt, at hon hevur verið aftan fyri tjaldið tað mesta av tíðini, men sum uttanríkisráðharri skal hon fram á pallin. Og hon fær nóg mikið at takast við. Irak er framvegis ein kreppa, og Miðeystur er ein onnur. USA vil hava fleiri lond at hjálpa sær í Irak, men sum er gongur tað tann øvugta vegin, tí eitt fyri og annað eftir hava lond boðað frá, at tey fara at taka sínar hermenn úr Irak. Hesari gongdini skal Rice royna at venda.

Góðtekur Senatið hana sum uttanríkisráðharra, verður Condoleezza Rice tann fyrsta svarta kvinnan, sum umsitur amerikanska uttanríkispolitikkin og onnur kvinnan í hesum embætinum. Tann fyrra var Madelaine Albright, sum var uttanríkisráðharri hjá Bill Clinton.

Heimsins skjótasta flogfar

Gongst sum ætlað verður tað bæði skjótari og og bíligari at ferðast í framtíðini

FLÚGVING
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

Eitt royndarflogfar hjá amerikonsku rúmdarumsitingini NASA hevur sett nýtt met.

Fyrst varð tað ómannaða flogfarið, sum eitur X-43A, set upp á eitt hernaðarflogfar av slagnum B52. Tá tað var komið upp í ta ætlaðu hæddina, varð ein rakett í ómannaða flogfarinum sett í gongd, og við henni eydnaðist tað at fáa flogfarið at flúgva 11.000 kilometrar um tíman ella tíggju ferðir skjótari, enn ljóðið ferðast. Tað er nýtt met.

Royndin, sum bleiv gjørd í Kalifornia, er tann triðja og seinasta. NASA sigur, at tøknin í X-43A, sum ein ein samanseting av einum flogfari og einari rakett, kann nýtast í vanligari flogferðslu, og at hon fer at gera tað skjótari, bíligari og tryggari at flúgva.

ÚF og SvF hoyra heima í Havn

Landsstýrismaðurin við mentamálum er ikki sinnaður at flyta nýggja loftmiðlastovnin úr høvuðsstaðnum

LOFTMIÐLAR
Eydun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

– Eg haldi ikki, tað er rætt júst nú at fara at kanna, hvørt samanlagdi loftmiðlastovnurin skal leggjast uttan fyri Havnina.

Tað segði Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður við mentamálum, tá ið hann svaraði einum fyrispurningi frá Kára P. Højgaard í løgtinginum týsdagin.

Sjálvstýrismaðurin hevði spurt landsstýrismaðurin, um hann tók undir við møguleikanum at kanna, um tann samanlagdi loftmiðlastovnurin kundi leggjast uttan fyri Havnina.

Men tað ger Jógvan á Lakjuni ikki.

– Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya hava ikki av tilvild havt bústað frá byrjan í høvuðsstaðnum, og tað haldi eg, at stovnarnir, tá ið teir eru samanlagdir, framvegis eiga at hava, segði Jógvan á Lakjuni.

Kanningar verða nú gjørdar, um ein nýggjur sjónvarpsbygningur kann byggjast saman við Útvarpshúsinum í Sortudíki, upplýsti Jógvan á Lakjuni í sínum svari.

Trý fólk uppsøgd hjá Landsverki

Orsakað av vantandi játtan til Landsverk á landsins figgjarlóg fyri 2005, hevur tað verið neyðugt at siga trimum fólkum úr starvi. Umframt hetta, fer eisini eitt fólk niður í hálva tíð.

Støðan er tann, at figgjarlógaruppskotið fyri næsta ár vísir eina minking uppá eina hálva millión krónur. Harnæst fara sáttmálabundnar lønarhækkingar at kosta stovninum umleið hálva aðru millión eyka.

Úrslitið er, at Landsverk á komandi figgjarlóg kemur at vanta pening til lógarbundnar lønarútreiðslur svarandi til seks ársverk í mun til lønarkarmin í ár.

Avleiðingarnar av hesum skerjingum eru, at neyðugt hevur verið at siga hesum fólkum úr starvi.

Leiðslan á Landsverk harmast um støðuna, men vísir samstundis á, at orsøkirnar til, at tað slepst undan at siga enn fleiri fólkum úr starvi fyri ein part eru tær rationaliseringar, ið eru framdar á stovninum fyrr í ár og fyri ein part ein ávís náttúrlig frágongd millum starvsfólkið.

–eys

Skipalistin 2005

· **SKIPALISTIN** *hevur føroyskan álmanakka, sum* ***sambært lóg*** *skal verða umborð á øllum bátum. Skipalistin lýkur tískil lógarinnar krøv.*
· ***Streymtalvur*** *fyri árið 2005*
· *Klokkutíðir fyri* ***vestfallskyrrindi.***

175,-



Hentur at hava!

Fæst nú um alt landið!

Oyri og Oyrarbakki

Útbjóðing

Við hesum verður partur av arbeiðinum at breiðka vegin millum Oyrarbakka og Oyri og at gera omankoyring til bátahylin á Oyrarbakka boðið út í almenna lisitatión. Arbeiðið fevnir um avgrevstur av mold og uppfylling við gróti, og skal hetta verða liðugt í seinasta lagi 31. desember 2004.

Høvuðsnøgdirnar eru umleið:
Avgrevstur av mold 2.500 m3
Uppfylling við gróti 6.000 m3

Lisitatiónin verður hjá Landsverki, Tinghúsvegi 5, Tórshavn, **týsdagin 23. november 2004, kl. 15.00.**

Ástaðarfundur verður mánadagin 22. november 2004, kl. 13.00.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast frá 18. november 2004 til í seinasta lagi 19. november 2004, kl. 15.00, og verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støddar 2.000 kr., ið verður at flyta á konto nr. 128.229.6 í Føroya Sparikassa ella á konto nr. 431.468.0 í Føroya Banka. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent óskalað í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina.

www.landsverk.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

Útbjóðing

Vi hesum verður partur av arbeiðinum at breiðka vegin millum Streymnes og Brúnna um Streym, boðið út í almenna lisitatión. Arbeiðið fevnir um avgrevstur av mold og uppfylling við gróti og skal hetta verða liðugt í seinasta lagi 31. desember 2004.

Høvuðsnøgdirnar eru umleið:
Avgrevstur av mold 12.000 m3
Uppfylling við gróti 13.000 m3

Lisitatiónin verður hjá Landsverki, Tinghúsvegi 5, Tórshavn, **týsdagin 23. november 2004, kl. 11.00.**

Ástaðarfundur verður mánadagin 22. november 2004, kl. 10.00, og møtt verður við húsið hjá Landsverki við Streymin.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast frá 17. november 2004 til í seinasta lagi 19. november 2004, og verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støddar 2.000 kr., ið verður at flyta á konto nr. 128.229.6 í Føroya Sparikassa ella á konto nr. 431.468.0 í Føroya Banka. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent óskalað í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina.

www.landsverk.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land